Jákup Egholm Hansen:

# Tekniskur stjóri hjá Tórshavnar kommunu

**Tórshavnar býráð hevur í dag sett Jákup Egholm Hansen í starv sum tekniskur stjóri**



Tekniski stjórin er ovasti leiðari fyri teknisku fyrisitingini og høvuðsuppgávan verður at stjórna og samskipa arbeiðsøkini í teknisku umsitingini og hava umsitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina um hendi.

Jákup Egholm Hansen er útbúgvin arkitektur og hevur nomið sær kunnleika innan leiðslu og fígging, bæði á Handilsskúlanum og á Robert Gordon University, har hann hevur fingið eitt Master prógv.

Umframt holla útbúgving hevur Jákup Egholm Hansen drúgvar royndir bæði í Føroyum og uttanlands. Millum annað hevur hann verið deildarleiðari fyri teknisku deild hjá Sørvágs kommunu og var m.a. við til skúlabygging, útstykking og tá terminalurin varð útbygdur. Hjá Landsbyggifelagnum hevði Jákup Egholm m.a. ábyrgd av verkætlanini fyri Gøtu kirkju. Harumframt hevur hann verið projektleiðari, tá Parkin í Keypmannahavn varð umbygd.

Tey seinastu árini hevur hann verið varastjóri/stjóri í P/F Samvinnufelagnum í Sandavági. Í tíðarskeiði 93-02 var Jákup Egholm Hansen eisini formaður í felagnum Rækjuskip og hevur verið við í fleiri fiskivinnusamráðingum við onnur lond.

Í løtuni starvast Jákup Egholm Hansen sum projektsamskipari hjá P/F SMS í sambandi við umbyggingina.

Jákup Egholm Hansen tekur við starvinum 1. oktober.

†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Jógvan Simonsen við Tváttá, Sandavágur**, fer av Ellisheiminum heim í Sandavágs kirkju í kvøld kl 18. Jarðarferðin verður fríggjadagin kl. 14. Tey, ið vilja minnast Jógvan, kunnu lata eina gávu til Sandavágs kirkju; konta í peningastovninum.

Kistan við **Olivur Veihe Sundberg** fer frá Holsteinsborg kirkju í Rude, týsdagin 22. august kl. 13.

**Hans Jørgen Jensen, Hvalvík**, andaðist mikudagin 26. juli á Sjúkrahúsi í Ukraine, 61 ára gamal. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Dagurin í morgin**

**18. august. Agapetus.** Deyður umleið ár 300. Ein 15 ára gamal drongur, sum var tikin av døgum fyri kristnu trúgv sína.

# Tøkk

Hjartaliga takk fyri sýnda samkenslu og hjálp,
tá okkara kæra

**Magnhild Olsen**

Miðvágur, ættað úr Hósvík

andaðist og varð jarðað.
Ein hjartans tøkk til tykkum á Ellisheiminum í Miðvági fyri umsorgan í so mong ár.
Takk til Maluna og Ann fyri góð orð við kórsetingina og Emil Olsen, prest, til jarðarferðina.
Eisini takka vit sangarum, berarum, kirkjutænarum og teimum, sum hjálptu til við ervið, og tykkum mongu, sum fylgdu Magnhild, bæði frá Ellisheiminum í Miðvági og frá Hósvíkar kirkju.
Takk fyri peningagávu til Javna.

*Familjunnar vegna*
**Elin Maria**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu, tá ið kæri maður, pápi, verfaðir og abbi okkara

**Esmar A. Jacobsen**

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til Justinus Poulsen og Sverra Steinhólm, prest, sum talaðu í kapellinum og í kirkjuni.
Tøkk til kirkjutænarar og sangarar.
Tøkk til starvsfólki á Tjarnargarði fyri røkt og umsorgan og somuleiðis til starvsfólkini á B6.
Tøkk fyri blómur, kransar, peningagávur til Kirkjuliga Missiónsfelagið og tøkk til tykkum øll, sum fylgdu Esmari til hansara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Maud og børnini við familju**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum,
at kæri sonur, bróður og pápi okkara

**Hans Jørgen Jensen**

tannlækni, ættaður úr Vindblæs
búsitandi í Hvalvík

andaðist á sjúkrahúsi í Ukraina mikudagin 26. juli
61 ára gamal.
Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

*Fyri tey avvarðandi*
**Anna, Anker, Nicolaj, Anna og Njál við familju**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum,
at kæri pápi okkara

**Jógvan Simonsen**

við Táttá, Sandavágur

andaðist týsdagin 15. august 82 ára gamal.
Kistan fer av Ellisheiminum heim í Sandavágs kirkju hóskvøldið kl. 18.00.
Jarðarferðin verður fríggjadagin kl. 14.00.

**Herdis, Anna Maria og Elisabeth**

Tey, ið ynskja at minnast Jógvan, kunnu lata eina peningagávu til Sandavágs kirkju. Konta í peningastovnunum.

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við